# Góður og bíligur skúlamatur

**Íslendsk skúlabørn fáa dagliga heitan mat á skúlanum fyri einar 25,- krónur í okkara peningi. Skipanin er gomul og riggar so væl, at eingin grund tykist vera til at broyta nakað**

VITJAN
*Edvard Joensen*

**Aratunga á Suðurlandinum:** Bæði í barnagarðinum og pensionistafelagnum eta tey døgurða úr skúlakøkinum í Aratungu í Bláskógabyggð á Suðurlandinum í Íslandi. Og tey gjalda bara umleið 25,- krónur í okkara peningi um dagin.

Tað steðgar ein bussur uttan fyri skúlan hjá Bláskógar Kommunu, og eitt ferðalag við føroyingum kemur úr honum. Hetta eru fólk frá føroysku kunningarstovunum, Ferðaráðnum og onkur blaðmaður, sum eru á vitjan hjá íslendskum ferðavinnufólki. Vertur í dag er Ásborg Arntórsdóttir, sum er ferðamálafulltrúi í Árnessýslu á Suðurlandinum.

Vit hava ferðast um Suðurlandið fyrrapartin og fara nú at fáa okkum døgurða i skúlakøkinum, greiðir Ásborg Arntórsdóttir frá.

Hon veit at siga frá, at skúlin, vit nú eru stødd í, er bygdur í 1928, og longu árið eftir, í 1929, fór kommunan undir eina skipan við mati til skúlabørnini, sum so við og við er víðkað til eisini at umfata bæði barnagarðsbørn og pensionistar í kommununi.

Tað eru fleiri slíkar skipanir í Íslandi, greiðir hon frá. Men ikki allar eru líkar kortini.

Í Bláskógar Komunu búgva umelið 1.000 fólk, sigur Ásborg, og her eru bæði barnagarður og framheildsdeild í skúlanum, umframt ítróttartilboð, musikskúli og slíkt, sum væntað verður av eini kommunu í dag.

Komin inn í matarhøllina verða vit móttikin av manni, sum kunnar seg sum Ragnar Ragnarsson, borgarstjóra í kommununi. Hann er eisini komin at fáa sær steikt seyðakjøt við brúnum eplum, grønmeti av ymsum slagi, reyðkáli og brúnari sós. Og mjólk afturvið. Nógva mjólk drekka tey afturvið matinum, greiða tey frá. Serliga í skúlanum.

Vit leggja til merkis, at eisini fleiri eldri fólk, serliga gamlir menn, sita í rúminum og eta.

– Jú, hetta eru pensionistar í kommununi, sum koma higar at fáa sær døgurða. Teir, sum eru so birgir. Onnur fáa hann koyrdan heim. Fyri sama prís sum skúlabørnini. Og so er tað barnagarðurin, sum eisini fær matin koyrdan út til stovnin, sigur Ásborg, ferðavinnufulltrúi.

Hon greiðir frá, at trý fólk arbeiða í skúlakøkinum og umleið hálvtannaðhundrað fólk eta dagliga døgurða frá teimum.

Skúlin verður ikki bara brúktur til vanliga undirvísing, sigur Ásborg Arntórsdóttir. Børnini eru her allan dagin. Eftir vanliga skúlatíð er tað ítróttur, tónleikur og hvat nevnast kann, sigur hon. So hetta er í grundini teirra heimur frá tíðliga á morgni til nakað væl út á seinnapartin.



*Ásborg Arntórsdóttir hevur kend ferðamál sum bæði Gullfoss og Geysir í øki sínum*

*Mynd: Edvard Joensen*



*Skopuningur og heimasandamaður hittast í Reykjavík. Sólvit Simonsen, h.m. er stokkin inn á gólvið hjá Rúna Hentze, leiðara á Ørkini, sum heldur, at føroyingar hava nógv at læra av íslendingum i ferðavinnuhøpi*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Íslendingar duga betur enn føroyingar

**Íslendingar duga betri at fáa burtur úr ferðavinnuni, enn føroyingar gera. Ein partur av muninum er infrastrukturirin, sum er nógv betri í Íslandi, heldur leiðarin á føroyska sjómansheiminum í Reykjavík**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*



*Íslendingar eru heldur ikki lítaleysir og kunnu hinvegin eisini læra okkurt av føroyingum, heldur Davíð Samuelsson, leiðari á kunningarstovuni í Hveragerði á Suðurlandinum*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Reykjavík:** Íslendingar duga nógv betur enn føroyingar at vinna pening burturur úr ferðavinnuni, heldur Rúni Hentze, sum er leiðari á Sjómansheiminum Ørkini í Reykjavík.

– Íslendingar fáa pengar burtur úr øllum, sigur Rúni Hentze. Men teir eru eisini betri útgjørdir, enn føroyingar eru, til at taka í móti fremmandum ferðafólki. Her er alt, sum fólk kunnu hugsa sær, vísir hann á. Og tað, sum einamest hevur skapt alt hetta, er hugflogið hjá teimum, sum starvast í ferðavinnuni ella hava hana sum hjávinnu.

– Íslendingarnir tykjast síggja møguleikar í øllum. Hvørt tarablað og hvørt rossatjóður verður umsett til pening frá fremmandum ferðafólki, sigur hann.

Sjálvandi hava íslendingar betri umstøður og størri møguleikar á so mangan hátt, enn føroyingar hava, ásannar Rúni Hentze. Landið er størri og fjølbroyttari við nógvum náttúrumøguleikum, sum fáur annar hevur.

Men hann heldur kortini, at tað, vit hava at bjóða í Føroyum, verður ikki nóg væl gagnnýtt.

– Tað er heilt vist, at kóparnir vestantil undir Sandoynni og fyri tann skuld kring allar oyggjarnar, høvdu langt síðan verið gjørdir til ferðavinnumál, um íslendingar høvdu teir. Hygg bara at Húsavík á NorðurEysturlandinum, sigur hann og sipar til, at har hava tey upp á eini fimm ár bygt upp eina størri vinnu við einum hvalasavni og útferðum við skipi at hyggja at hvali. Serliga er tað stórhvalurin, sum hevur áhuga hjá ferðamanninum, sum fegin vil gjalda fitt av peningi fyri at síggja hetta stóra djórið.

Eitt annað, sum íslendingar eisini tykjast duga betri enn føroyingar, er at veita tænastu, heldur Rúni Hentze.

– Ikki tað, at føroyingar ikki eru blíðir og fyrikomandi, men við hvørt noyðist ein kortini tíverri at ásanna, at tænastan er ikki tann optimala, tá ein hevur við fremmandafólk at gera. Hetta duga íslendingar nógv betri, heldur hann.

Leiðari á kunningarstovuni í Hveragerði á Auðurlandinum, er hálvi føroyingurin Davíð Samúelsson. Hann ásannar, at tað ivaleyst er okkurt, føroyingar hava eftir at læra í ferðavinnuni. Og sumt kunnu teir ivaleyst eisini læra av íslendingum.

– Men íslendingar duga heldur ikki alt til tað fullkomna, sigur hann. Tak nú hesar bóndagarðarnar, har fólk eru farin undir at taka í móti ferðafólki. Tey selja mjókakvoturnar og byggja summarhús. Duga ikki eitt orð av fremmandamáli, og so verður tað eisini hareftir, sigur hann.

Jú, rætt er, at íslendingar duga betur í summum førum, men aðrastaðni eru føroyingar eisini væl við, sigur Davíð Samúelsson. So kanska kunnu vit eisini læra okkurt hvør av øðrum, heldur hann.



# Nýggj vatnleiðing í Miðvági



*Sum ein annar ormur liggur vatnleiðingin hjá Miðvágs Kommunu smáar hálvtannaðhundrað metrar út eftir Leitisvatni, áðrenn rørini verða søkt og fest í botn við serligum festum*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Við nýggjari vatnleiðing úr Leitisvatni fer Miðvágs Kommuna at tryggja, at vatnið í bygdini altíð er púra reint**

VATNLEIÐING
*Edvard Joensen*

**Miðvági:** Miðvágs Kommuna leggur nýggja vatnleiðing úr Leitisvatni og fer sostatt at tryggja borgarunum reint vatn í framtíðini.

Miðvingurin Mikkjal á Ryggi bað í einum av mongu sálmum sínum Pætur fara út á dýpið við nót síni. Tað gjørdi hann so við góðum úrsliti. Nú royna bygdarmenn Mikkjals at gera tað sama við vatnleiðingina í bygdini. Teir fara út á dýpið á vatninum, og vænta at fáa líka gott úrslit, sum Pætur gamli fekk í síni tíð.

Miðvágs Kommuna hevur gjørt av at leggja nýggja vatnleiðing einar 140 metrar út í Leitisvatn við Gróthústanga. Nýggja inntakið fer at liggja á áttaníggju metra dýpi, sigur Georg Hansen, kommunuskrivari í Miðvági. Hetta fer at gera, at tað altíð verður reint vatn, ið tikið verður inn í reinsiverkið.

Liggur inntakið ov nær landi, ella á ov grunnum vatni, er vandi fyri, at grugg kemur í, tá vindur ella áarføri er, sum kann skola runu og annan lort við sær út frá landi.

Nýggju vatnrørini, sum eru tvey í tali, eru strekt út á vatnið og fortoyað, men skulu leggjast á botn, har tey verða fest við serligum festum. Hetta arbeiðið verður gjørt av froskmonnum, og verður tað væntandi einaferð í næstu viku, sigur Georg Hansen. Hetta skal eisini gerast, tá líkindi eru til tess.

Tá sjálv leiðingin er løgd, er okkurt smávegis eftir at gera inni á sjálvum reinsiverkinum, áðrenn nýggja vatnleiðingin kann takast i brúk. Øll verkætlanin fer at kosta Miðvágs Kommunu einar 300.000,- krónur, sigur kommunuskrivarin.

Miðvágs Kommuna hvur nýtmótans vatnreinsiverk, har vatnið fyrst fer í gjøgnum sandfyltur, áðrenn tað verðu strálað fyri síðan at fara út í vatnleiðingina til brúkaran.

Hendir tað, at onkrir partiklar fara ígjøgnum sandfyltrini, kann tað gerast ein trupulleiki í strálingini. Men nú, inntakið er lagt út á djúpt vatn, skuldi hesin møguleikin verið burtur, heldur Georg Hansen.

Vatnleiðingsbrot var í fjør orsøk til rættiliga stórar trupulleikar við vatninum í Miðvági. Ein partur av hesum komst av, at vatnleiðingin tá lá undir koyrivegi, og tí var heldur truplult at finna brotið. Hesum hava tey nú lagt upp fyri í Miðvági og hava lagt nýggju vatnleiðingina soleiðis, at altíð ber til at koma at henni.

Miðvágs Kommuna arbeiðir eisini við nýggjum útstykkingum í framhaldi av verandi bygging Norður í Heiðum. Eini 15 grundstykki eru á veg har, sigur kommunuskrivarin.

Eisini eru menn í ferð við at gera gøtur í viðalundini á Tungu niðan fyri kirkjuna, sigur hann.

# Maersk Air vil samstarva við Atlantic

**Nýggi stjórin í Maersk Air hevur ætlanir um samstarv við flogfeløgini í norði um at sleppa at flyta ferðafólk frá hesum feløgunum longur suður í Europa**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Stendur tað til stjóran í Maersk Air, Finn Øelund, verður samstarv millum Maersk Air og Atlantsflog um ferðafólk, sum ferðast úr Føroyum suður í Europa*

Danska flogfelagið Maersk Air ynskir samstarv norðureftir. Ein av møguligu samstarvsfeløgunum er føroyska flogfelagið Atlantic Airways.

Nýggi stjórin í Maersk Air, Finn Øelund, hevur latið leka út, at hann ynskir samstarv við fleiri flogfeløg norðan fyri í kappingini um ferðafólk úr Danmark suður í Europa.

Per Brinch, kunningarstjóri í Maersk Air, sigur, at hugsanin hjá stjóranum í felagnum er at royna at fáa í lag samstarv við øll flogfeløg, ið halda til norðan fyri Danmark. Her undir eru so feløg sum Finnair, Norwegian, Air Greenland, Iceland Air og tað føroyska Atlantic Airways.

Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways váttar, at hann hevur drukkið kaffi saman við Finn Øelund, stjóra á Maersk Air. Meira er ikki at siga um hendan leikin hjá nýggja stjóranum, sigur Magni Arge. Ongar veruligar samráðingar sum so hava verið millum partarnar.

Hann metir gongdina við nýggju tilboðunum og átøkunum hjá Maersk Air soleiðis, at felagið er mest áhuga í at flúgva suðureftir, og kanska vil hava samstarv soleiðis, at Atlantsflog kan lata ferðafólk úr Føroyum til ruturnar hjá Maersk Air longur suður í Europa.